Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

# Vensil í Køkinum av Toftum

**Føddur 14. september 1906 Deyður 17. august 2004**



Í síðsta mánað legði Vensil Olsen á Toftum árarnar inn. Hesin merkismaður, sum fylti so nógv í bygdarmyndini á Toftum. Hann var næstan 98 ára gamal, nú hann andaðist.

Vensil fór til skips í 1922 við deyðsiglara. Nólsoyggin var eitt av skipunum, sum framvegis ikki hevði fingið motor , og tí vóru tað bara seglini, ið førdu teir um høv. Skipari við Nólsoynni var ein av bygdarmonnunum hjá Vensili, Michael í Tøðu.

Síðani fór Vensil við Buttercup við Andriasi í Túni sum skipara. Nøkur ár seinni fór hann við Volunteer, har Piddi á Lakju var fiskiskipari, og Jens uppi á Regni var flaggskipari, tí Piddi var so ungur.

Umleið 1930 varð Volunteer ásigld á Jerpagrunninum undir Íslandi. Teir vóru akkurát byrjaðir nýggjan túr, tá ein enskur trolari rendi inn á stýriborðsbógv. Volunteer fór úr spónalagnum og gjørdist vrak. Tað eydnaðist teimum kortini at pjøssa hana so frægt, at teir kundu sigla heim. Skipið varð lagt fyri ringarnar innanvert Hulk og varð liggjandi har.

Vensil fór nú aftur við Buttercup, og enn einaferð var ein toftamaður skipari. Tað var Hans í Norði. Buttercup fór seinni á land á Siglunesi og bleiv vrak.

Eftir tað fór Vensil við Expedit hjá Evensen við Andriasi í Túni sum skipara. Um hetta mundið fullu fiskaprísirnir nógv, og tað bar í sær, at nógv reiðarí brendu inni við fiskinum og fóru á heysin. Eitt teirra var reiðaríið hjá Expedit.

So hendi tað, at Andrias keypti skonnartina Mjóvanes og Vensil fór við Andriasi har umborð, og hann var við Mjóvanesi til annar heimsbardagi brast á.

Undir krígnum róði hann út við deksbátinum Nýpuni saman við sváginum Jens uppi á Regni. D.P. Højgaard átti Nýpuna.

Tá kríggið var av, fór Vensil at arbeiða fisk uppi á landi hjá D.P. Højgaard. Og tá so tað nýggja og snotiliga flakavirkið Nykur í 1969 fór at taka ímóti fiski í heimbygdini, fór hann har at arbeiða og arbeiddi fyri tað mesta í saltfiskinum, til hann gavst fyri aldur. Allir mans í saltfiskakjallaranum tóku til hvussu kvikur Vensil var at flekja, hóast aldurin var vorðin høgur.

Vensil var ein arbeiðsrót, og hann legði nógv á seg sjálvan bæði á sjógvi og landi. Evnagóður var hann sum fáur, kvikur og sera bráur. Tað kom ikki fyri, at nakar mátti bíða eftir honum.

Vensil var sum oftast bestur at fiska við snørinum. Men á dekkinum lá hansara partur so sanniliga ikki eftir. Tiltikið er avrikið, tá hann umborð á Volunteer ein roktúr á Suðurlandinum flakti 1600 toskar eina nátt. Hann gjørdi alt sjálvur, bæði spretti og tók ryggin úr.

Vensil var sonur Julius Olsen úr Hálvdanstoft á Toftum og Juliu, fødd Joensen, av Kjalnesi í Kollafirði.

Pápin, Julius, var smiður og tá føtur skuldu setast undir egið borð, fann hann eina øðrvísi loysn enn tey flestu. Húsini í Køkinum eru sett saman av tveimum húsum. Ovari parturin stóð suður úr húsunum í Túni. Tann niðara partin, sum er tann breiðari, keypti Julius oman av Hamri. Í teimum húsunum hevði verið køkur og soleiðis kom heimið hjá Vensil og teimum at eita í Køkinum. Frammanundan hevði Hákunarstova, sum er eitt av teimum gomlu búplássunum á Toftum, staðið har Køkshúsini standa.

Yngsti beiggin hjá Vensili, Hanni og kona hansara Paula, settu barnaheimið í Køkinum í upprunaligan stand. Nú hevur Fornminnisfelagið á staðnum keypt húsini, og tey eru ein virðiligur varði um farna tíð.

At Vensil var lættur av lindi, kom til sjóndar eitt nú í kortspæli. Dúgliga varð spælt sjavs í Køkinum tey myrku vetrarkvøldini. Var ikki fullmannað tá spælið byrjaði, tók mamman Julia kortini upp í hondina, og spældi til tann fjórði maðurin kom.

Í mínum uppvøkstri gekk Vensil systkinabarnið nógv niðan til okkara. Minnist at hann ofta slangaði sær á beinkinum og so fóru vit børn at beistast við hann. Tað dámdi honum og ikki minni okkum.

Longu tá Vensil var smádrongur sást, at hann hevði ógviliga góðan hug at arbeiða. Pápin, Julius, gjørdi honum ein lítlan rimaleyp, og við leypi á baki plagdi hann at fara við pápanum at smíða.

Julius var sløttumaður hjá Sámali bónda á Kjalnesi. Sum smádrongur var Vensil mangan við pápanum, og longu tá vísti hann gott hegni at fáast við jørðina. Seinni í lívinum velti hann nógv upp úr nýggjum í gerðinum hjá verpápanum, Jákupi bónda.

Sjálvur hevði hann altíð nakrar heimaseyðir, sum hann gekk uppí við lív og sál. Tað var ein sonn bygdarmynd tá Vensil fór við hoysekki á baki gjøgnum bygdina.

Vensil hevði stóran tokka til heimbygdina Toftir. Tá hann var heima av skipi, og eftir at hann fór at arbeiða uppi á landi, var hann ikki av bygdini meira enn hægst neyðugt. Gott prógv um hetta er, at hann ongantíð hevði verið á Ólavsøku, hóast bara Flesjarnar og Hoyvíkshólmur eru millum Havnina og Toftir.

Í 1931 giftist Vensil við Nannu oman av Regni. Tey fingu átta børn saman, fimm gentur og tríggjar dreingir. Genturnar Juliu, Nicolinu, Emmu, Jastrid og Rúnu, og dreingirnar Julius, John og Vernar.

Í seinastuni hava Nanna og Vensil búð á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi og har býr Nanna framvegis.

Vensil er farin. Men góðu minnini um hendan merkismannin liva okkara millum.

**J.M.M.**

## Fyrsta sandoyarkvinnan á ting

Í sambandi við at Páll á Reynatúgvu, tingmaður Tjóðveldisfloksins í Sandoy, hevur biðið Løgtingið um sjúkrafarloyvi, hevur Meiken Krabenhøft úr Skopun fyribils tikið sæti á tingi.

Meiken stillaði fyrstu ferð upp til løgtingsvalið í januar og gjørdist nummar tvey á lista Tjóðveldisfloksins í Sandoy.

Tjóðveldisflokkinum kunnugt, er hetta fyrstu ferð, at ein kvinna úr Sandoyar valdømi hevur sitið á tingi.

Frammanundan hevur Tjóðveldisflokkurin størstu kvinnuligu umboðanina á tingi. Meðan Maiken Krabenhøft situr á tingi, er henda umboðan økt úr einum fjórðingi upp í meira enn triðingin.



*Maiken Krabenhøft, fyrsta sandoyarkvinna á tingi. Her saman við floksfelaganum Hergeiri Nielsen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Arnhold Davidsen farin

Fríggjakvøldið 17. september andaðist Arnhold Davidsen á Toftum 84 ára gamalur. Arnhold var ein bygdarmynd á Toftum og væl kendur kring alla oynna. Hann arbeiddi í mong ár sum bilførari.

Arnhold á Kvíggjarheyggi, sum var føddur 23. juni í 1920, var sonur til Niclas og Annu Helenu Davidsen. Hon var úr Hoygarðinum á Toftum, og hann var av Kvíggjarheyggi á Nesi. Tey bæði áttu sjey børn: Dávur, Kristianna, Hassadi, Arnhold, Mary, Nelly og Anni. Eftir á lívi eru Kristianna, Dávur, Mary og Anni. Hassadi búði í Klaksvík, og Nelly búði á Kvíggjarheyggi. Anni býr í Heiðum, Mary býr í Havnini, Kristianna býr á Toftum, og Dávur býr í sambýlinum á Toftum.

Arnholdi dámdi frá barni av væl at flóta og veiða, og hann hevði frá heilt ungum av góðan hug til jørð og landbúnað. Tá ið hann var fjúrtan ára gamalur, fór hann til Danmarkar, har hann í fýra ár var á bóndagarði í Jyllandi. Stutt undan, at kríggið breyt út í 1939, kom hann aftur til Føroya. Undir krígnum sigldi hann eitt nú við Gunhild. Tá ið kríggið var liðugt, fór Arnhold saman við knappliga sjeyti øðrum føroyingum við hollendskum reiðarí á hvalaveiðu í Suðuríshavinum. Teir fóru úr Føroyum í september í 1946, og teir vóru við hús aftur í mai í 1947.



Arnhold mundi vera ein tann fyrsti á Toftum, sum fekk sær koyrikort. Tað var í 1944. Nakað eftir, at hann var komin aftur av hvalaveiðuni, fór hann at koyra bil, og tað gjørdist lívsstarvið hjá honum at koyra buss, lastbil og hýruvogn. Eitt nú koyrdi hann í fleiri ár toftabørnini, sum gingu í framhaldsskúla á Glyvrum. Tað hevur so ofta verið tikið til, hvussu lagaligur hann var at fáast við skúlaungdómarnar.

Arnhold var sera fryntligur og fyrikomandi maður, og hann var altíð klárur at dugna og veita eina hjálpandi hond. Arnhold gekk alla sína tíð høgt upp í heimaseyðin, og eftir at hann fyri einum tíggju árum síðani var givin at koyra lastbil, helt hann fram við at koyra persónbil inntil eina ferð í vár, tá ið hann gjørdist sjúkur, og tað skjótt fór at ganga skeiva vegin.

Í 1951 giftist Arnhold við Henny, fødd Højgaard, og ættað úr Rituvik. Tey búsettust við Toftagjógv. Hetta var í hjartanum í bygdini. Nógv ferðsla var har um vegir, og mong duttu inná gólvið og nutu blíðskap.

Henny og Arnhold eiga seks børn: Aloma, Hanus, Niclas, Annika, Harda og Fróði. Hanus og Harda búgva í Havnini, Fróði býr í Saltangará, og Aloma, Niclas og Annika búgva á Toftum.



## Tøkk

Øllum tykkum, ið mintust til mín og á ymiskan hátt gleddu meg á 75 ára føðingardegi mínum 5. september, takki eg hjartaliga.

Vinarliga
**Elinborg**

### 85 ár føðingardagur

Leygardagin 2. oktober verður Johanna Johannesen, Johanna í Kinn, Fuglafjørður, 85 ár. Dagurin verður hildin heima frá kl. 17–22.

### Dagurin

**Oktober:** Í gamla rómverska kalendaranum byrjaði árið við marsmánði, og oktober var so áttandi mánaðurin, octo merkir júst átta. Hjá okkum er hann tann tíggjundi.

**1. oktober, Remigius**, deyður 533. Galliskur aðalsmaður, sum longu 22 ára gamal varð valdur til biskup í Reims. Kristnaði Chlodoveh kong, sum var langabbi Karlamagnus. Remigius doyði 96 ára gamal.

# Jon Mortensen 65 ár



65 ár eru nú klikt inn á lívsins stempulklokku hjá tvøramanninum Jon Mortensen. Stempulklokkan skal halda skil á nógvum. Ungdómurin, manndómurin, børnini, konan, hús og heim, eydnan og hvussu nógvir dagar eftir eru á kortinum. Men størsti posturin hjá flestum okkum er helst brotið, sum eitur arbeiðið. Tíðin er so undarlig, at hon tykist so rúgvusmikil og long tá hon liggur frammanfyri og so stutt og horvin, tá ið hon er farin framvið. Fyri tveimum árum síðani kom Jon til brotið sum eitur pensjónstíð hjá politistum. 37 ár í samfelagsins tænastu vóru fokin framvið. Samvitskufulli og dugnaligi politisturin hevði røkt sína skyldu. Sum sýslumaður í Vágum, á Sandi og á Tvøroyri og sum politistur í Runavík og serliga í Havn. Men hvat nú?

63 ára gamal - tað er eingin aldur. Hugurin varð til sjógvin, men knøini søgdu nei. Nøkur ár gingu, dagarnir høvdu hug at líkjast. Onki varð av álvara at takast við.

Men dugnaskapurin, hjálpsemi og ídni, sum politiið í trý áratíggju fekk gleðina av, er nú komið bili nummar 5 hjá Auto til góðar. Tí hóast at Politiið heldur at orkan er ikki til arbeiði aftaná tey seksti trý, so er stempulklokkan hjá Jon so avgjørt ikki samd. Tá funktionerarnir møta til arbeiðis hevur Jon longu koyrt fleiri tímar og hann gevst ikki fyrrenn at Útvarpið hevur havt seinnu tíðindasendingina. Og so væl tað.

Ídnið og samvitskan sum Jon hevur lagt í arbeiðið hevur eisini merkt allar aðrar partar av lívi hansara. Stempulklokkan hevur havt úr at gera við at skráseta.

Serliga hava vit børnini havt gleðina av einum kærum, umhugsnum og skila-góðum pápa. Tú hevur dugað at leitt okkum á rættu kós - onkuntíð við nøkrum røttum orðum og aðrar tíðir við røttum gerðum. Hepnið hevur tú eisini við tær. Vit skulu ikki taka dagar ímillum hvør tykkara er betur giftur, men væl dugir tú at velja tær konu.

Vit eru komnar í heimin til eitt gott heim, sum tit bæði hava skapt tykkum. Fyrstu árini í Runavík, men serliga seinastu nógvi árini á Spógvavegnum í Havn hava tit ikki einans bygt eini hús, men eina borg um familju okkara.

Hóast at árini innan politiið hava verið nógv, var ikki altíð vit fingu so nógv at vita um hvat tú gjørdi. Men vit vita, at tá ið tú kom illa skaddur heim aftaná arbeiðstíð var tað róliga sinni í tær, sum helt verð okkara saman. Vita eisini, at tú gav Paul Watson og Sea Shephard ein skarpan gang. Tann tíð tað var.

Í oktobur 1962 helt verðin ondini. Sovjetsamveldið og USA hildu bæði hondini yvir reyða knøttinum - hvør blinkaði fyrst? Flestum kunnugt so var tað Khrushchev. Eisini har hevur stempulklokkan hjá Jon verið til arbeiðis. Eina løtu í 1962 vóru einans fáir hundrað metrar ímillum bumburnar hjá Khrushchev og ein ungan telegraf-ist av Tvøroyri, tá skipini hittust nærindis Cuba. Telegrafisturin gjørdist politistur og politisturin gjørdist taxasjafførur. Men hóast at starvsheitini broytast, so broytist maðurin ikki. Jon Mortensen fyllir í dag 65 - vónandi hava vit teg i 65 afturat.

**Hjartaliga tillukku frá døtrunum hjá tær.**